# Tað hegladi við smágróti

**Sterka spreingingin á Skála fríggjadagin kundi lættliga havt fólkaskaða við sær. Tað er Johan M. Jacobsen sannførdur um. Hús og bilur hansara hava fingið stóran skaða og eini stóri steinurin er komin niður ígjøgnum tekjuna og liggur á á loftinum. Konan er dagpleygumamma og nógv børn vóru í húsinum, tá spreingingin hendi**

SPREINGING

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Johan M. Jacobsen á Skála er sannførdur um, at sterka spreingingin, sum hendi fríggjadagin, kundi havt fólkaskaða við sær.

Kona hansara er dagpleygumamma og í grannahúsunum eru eisini dagpleygubørn

Tíbetur var veðrið so ringt fríggjadagin, at øll vóru inni og spældu. Høvdu tey verið uttanfyri, so hevði fólkaskaði verið, tí ivist eg ikki í, sigur Johan M. jacobsen.

- Tað larmaði sum eg veit ikki hvat. Tað er ikki ov mikið sagt, at tað hegladi við smágróti á Skála fríggjadagin. Eg var sjálvur staddur á skipasmiðjuni og tað var nógvur larmur, tá smágrót frá spreingingini rakti tekjuna har. Tá eg so kom niðan til hús var ringt skil. Har grótu øll og fleiri fólk ringdu niðan fyri at vita hvussu skilið var, tí tey høvdu hoyrt larmin, sigur Johan M. Jacobsen.

Hann ivast ikki í, at høvdu børnini, og fólk annars, verið úti, sum vanligt er, so hevði fólkaskaði staðist av.

### Fleiri buglur

Fleiri smáar buglur eru í húsatekjuni hjá Johan M. Jacobsen og eini steinurin er komin niður ígjøgnum tekjuna og ígjøgnum tróðurið og liggur nú á loftinum. Johan fegnast um, at hann hevur lagt plátur í á loftinum, tí annars hevði steinurin komið longur niður.

Eisini bilurin hjá honum hevur fingið skaða og fleiri buglur eru í av smágrótinum, sum hegladi yvir Skálabygd fríggjadagin, tá menn sprongdu fyri landsvegi omanfyri bygdina.

### Ikki fyrstu ferð

Johan hevur prátað við fleiri fólk um hendingina, og sjálvt í Søldarfirði høvdu tey merkt hørðu spreingingina, og har skulvu húsini.

- Tað ringasta er, at hetta er ikki fyrstu ferð, so ein bíðar bara til skaðin hendir av álvara, sigur Johan M. Jacobsen, sum metir, at sera illa er avstaðfarið, tá sprongt er og hann metir, at slíkt er sera ábyrgdarleyst.

# The Dreams snávaðu beint áðrenn málstrikuna

Tá seinasta undanumfarið í sendingini A cut varð sent fríggjakvøldið vóru einans fýra bólkar eftir, føroysku punkararnir í The Dreams var ein av teimum. Tveir bólkar komu í finaluna, so spenningurin var stórur. Tá avtornaði gjørdist greitt at donsku Alpine og bretsku Youth of Britain, vóru finalubólkarnir.

Hesir bólkar vunnu sær møguleikan at spæla eitt lag inn í upptøkuhøli í London, og sostatt kappast um møguleikan at hita upp fyri Anastaciu framman fyri 35.000 tónleikatystum týskarum.

The Dreams og italsku Frost vóru sendir heim, so tætt við málstrikuna. Men eingin ivi er um, at The Dreams hava fingið reklamuvirði í milliónupphæddum av at luttaka í trimum sendingum á MTV.

**nud**

Vegna vaksandi virksemi og víðkað virkisøki søkja vit eftir

**Verkfrøðingi/byggifrøðingi**

Í samstarvi við leiðsluna og onnur í fyrisitingini fevnir starvið í høvuðsheitum um:

- Tilboðsrokning
- Fyrireiking av byggimálum
- Projektleiðsla
- Avseting og uppmáting

Fyri rætta fólkið er talan um eitt starv við spennandi avbjóðingum, sum geva góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning. Viðkomandi kemur at arbeiða í einum toymi av teknikarum og formonnum.

Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving innan verkfrøði og/ella byggitøkni, og helst nakað av royndum innan omanfyri nevndu arbeiðsøki. Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult. Góður kunnleiki til edv-skipanir, ið vanliga verða nýttar til tílík arbeiðir, er ein treyt.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum og annars eftir avtalu partanna millum.

Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:

P/F Articon
Postboks 3109
110 Tórshavn

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 4. oktobur 2005.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jón Danielsen, tel. 350 700 ella 210 683.

Articon-samtakið, sum eisini fevnir um Byggi-Service, er ein byggifyritøka í støðugari menning. Feløgini takast við alt slag av byggi- og annlegsarbeiðum - bæði størri og smærri. Somuleiðis gera vit eisini alt slag av apteringsarbeiðum umborð á bátum og skipum. Tað starvast í dag umleið 80 fólk hjá feløgunum báðum, býtt millum arbeiðsfólk, handverkarar, maskin- og lastvognsførarar, formenn, byggi- og verkfrøðingar og skrivstovufólk.

Falkavegur 4, Postsmoga 3109, FO-110 Tórshavn
Tel 350 700, Faks 350 705, articon@articon.fo

ARTICON

# 200 verða í Rundfunk mikudagin



Tá 200, Gestir og Makel spældu á Atlantic Music Event í Vega, av danska sjónvarpsrásin TV2 við. Tikið varð upp á konsertini hjá 200, og prát varð gjørt við bólkin. Nú verður sendingin send, hon verður send á TV2 mikudagin kl. 16.00 føroyska tíð.

Rundfunk er ein tann best umtókta ungdómssendingin í donskum sjónvarpi, og hevur ofta eitt sindur løgnar og stuttligar vinklar, tá teir lýsa søgur, ella gera samrøður. Tað eru ikki nógv húsarhald í Føroyum, ið síggja TV2, men sambært Ivani Niclassen leiðara á mentanardeildini í sjónvarps partinum í Kringvarpi Føroya, kann talan verða um, at sendingin verður send í føroyskum sjónvarpi. Hetta verður tó ikki gjørt sum samsending.

**nud**

# Ummælarin rodnaði

Tá Páll Finnur Páll fríggjakvøldið høvdu útgávukonsert í REX, rodnaði ummælarin hjá Sosialinum Rókur Jakobsen, tá Páll Finnur Páll sungu teir grovastu tekstirnar.

Í ummæli í blaðnum í morgin skrivar Rókur, m.a.: "...lat tað verða sagt beinavegin, at eg rodnaði, tá ið teir grovastu sangirnir vóru spældir. Vit hava ofta lindið til at halda, at vit eru harðførir, men tá ið PFP seta sær fyri at vera grovir, tá krimpi eg tærnar. Hjá teimum er alt loyvt..."

**nud**

# Happing í Kvívíkar skúla

**Fyrilestur um avleiðingar av happing og hvussu happing kann fyribyrgjast**

HAPPING

Happing hendir á flestu skúlum. Tað er ikki altíð lætt at staðfesta, og ov ofta tí vit ikki ynskja at staðfesta at happing fer fram, tí vit ikki vita, hvat vit skulu gera. Bert meinaleysir barnalótir vilja summi halda, men at børn eru fyri happing kann fáa álvarsamar fylgir seinni í lívinum hjá teimum, staðfestir formaðurin í Sinnisbata.

Avleiðingar av happing og hvussu happing kann fyribyrgjast, er heiti á fyrilestri, sum Soffi Egholm heldur í Kvívíkar skúla mikudagin 28. september kl 19. Aftaná verða stuttir filmar um sama evni sýndir. Tiltakið er alment og øll eru vælkomin.

Soffi Egholm er formaður í Sinnisbata og hevur starvast sum psykoterapeutur innan barna- og ungdómspsykatri í umleið 20 ár. Sinnisbati fer seinni í ár undir eitt landsumfatandi átak, ið hevur til endamáls at varpa ljós á trupulleikarnar og fylgjurnar, sum kunnu standast av at børn verða happað.

Skúlastýrið fyri Kvívíkar Skúla skipar fyri tiltakinum.

KAMPANJUAVSLÁTTUR
UPP TIL
45.000 KR
VOLVO
FOR LIFE
VR BILAR